


*Jón Rasmussen, skipari, sigur, at túrurin hjá Norðborg í fjør summar, sum vardi einar 12-14 dagar, gav 1300 tons tilsamans, harav 800 tons var skráskorin og heilfrystur makrelur og umleið 500 tons var sildafløk*

# FEKK 7-8 KRÓNUR FYRI MAKREL UNDAN FØROYUM Í 2009

**LOYSIR TAÐ SEG? Nógv hevur verið gjørt burtur úr, hvørt tað loysir seg at fiska makrel undir Føroyum um summarið og virka fiskin til matna. Hetta er tíðin, tá fiskurin er fullur í æti, feitur og bleytur. Í fjør summar gjørdi verksmiðjuskipið Norðborg eina roynd, og Sosialurin hevur spurt skiparan á túrinum, Jón Rasmussen, hvussu henda royndin eydnaðist**

Vilmund Jacobsen

Í seinastuni hevur nógv verið gjørt burtur úr spurninginum um makrel í føroyskum sjógvi – og um okkara býtispart í avtaluni, sum vit hava havt við Noreg og ES um makrel.

Tað var Sosialurin, sum tíðliga í hesum árinum av álvara byrjaði at varpa ljós á hetta mál og vísti á, at óvanliga nógvur makrelur hevur verið í føroyskum sjógvi seinastu árini.

## Royndir við dyrging

Tíðliga í vár endurgóvu vit úr eini stuttari frágreiðing, sum Kristian Zachariassen á Havstovuni hevur skrivað um royndir við dyrging eftir makreli, har hann tosaði við menn, sum veiddu makrel við dorg í fjør summar.

Í byrjanini snúði skrivingin seg mest um møguleikarnar hjá útróðrarflotanum at fáa nakað burtur úr hesum tilfeingi, nú útróðrarflotin seinastu árini ikki hevur havt tað best, tí toska-og hýsuveiða hava verið heldur svikalig.

Sum tíðin leið, og nýggjar samráðingar skuldu vera millum strandalondini um framhaldandi avtalu um býtið av heildarkvotuni av makreli, kom í ljósmála, at landsstýrismaðurin í fiskivinnumálum, Jacob Vestergaard, neyvan fór at góðtaka, at Føroyar framhaldandi fóru at góðtaka at fáa sløk 5% av hesi heildarkvotuni. Landsstýrismaðurin er als ikki nøgdur við, at Noreg og ES stinga av við allari restini av eini heildarkvotu kvotu upp á umleið 570.000 tons.

## Eingin nýggj avtala

Makrelavtalan millum strandalondini gekk út við ársenda í 2009, og tað merkir, at tá samráðingar skuldu verða aftur í Reykjavík í mai í ár, var eingin avtala millum londini.

Orsakað av floglíkindum, nú øska so dúgliga ferðaðist í luftini úr Íslandi, vórðu samráðingarnar útsettar nakrar ferðir, men umsíðir eydnað-